# Fyrstur við tí seinasta

## 5 ferðir um vikuna


Sosialurin
Dansurin gekk so lystiliga í Havn síða 4
www.sosialurin.fo
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00
Arbeiðsleysur:
Jákup er liðugur í Herfølge
Ítróttur, s. 13–28

# Ja!

# Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______________

Bústaður: ______________

Postnr.: ______________

Bygd/býur: ______________

Undirskrift: ______________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




LANDSVERKFRØÐINGURIN

# ÚTBJÓÐING

Við hesum verður arbeiðið viðv. gerð av landsvegi frá Norðasta Horni niðan á Velbastaðháls boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið umfatar ein 9 m breiðan veg við tilhoyrandi súklubreyt, íroknað stálbogabrúgv um Sandá. Samlaða vegalongdin er umleið 2,3 km.

Høvuðsnøgdirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Avgrevstur av bleytum tilfari | 53400 m³ |
| Spreinging | 14500 m³ |
| Uppfylling og planering | 76100 m³ |
| Skráar | 14300 m² |
| Brúgv um Sandá | |

Lisitasjónin verður medio september 2001. Tíð og stað verður kunngjørt nærri í útbjóðingarskrivi, ið verður sent teimum bjóðandi.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 16. august 2001 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 2000,00, ið verður at flyta á konto nr. 128.220.6 í Føroya Sparikassa ella konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku aftan á lisitasjónina.

**Landsverkfrøðingurin**
Tinghúsvegur 5
100 Tórshavn
Telefon 311333
Telefax 314986

# Pedagogar

Søkt verður eftir 1 pedagogi 40 tímar um vikuna fyribils í eitt ár og 1 pedagogi 30 tímar um vikuna, at byrja 1. september 2001 ella eftir nærri avtalu.

Bæði størvini eru á stovu við 11 børnum í aldrinum 1–3 ár.

Vit ynskja at viðkomandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og mennandi gerandisdag í bólkinum
- dugir at samstarva, bæði við starvsfelagar og foreldur.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Skrivlig umsókn við prógvi, royndum og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 15. august 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Kristinu Eldevig, leiðara, á tlf. 312853 ella 212853.

**Stella Maris Vøggustova**
Varðagøta 11
Boks 1202
FO-110 Tórshavn
tlf. 312853 · fax 316954
E-mail: maris@post.olivant.fo

# Ársaðalfundur

Badmintonfelagið í Havn hevur ársaðalfund mikukvøldið 29. august kl. 19.00 í hølum felagsins.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Les meira á www.hbf.fo**

Nevndin

# Tórshavnar Ítróttarráð

**Úrslit av drátti 6. august 2001**

Hesir seðlar hava vunnið:

| | | |
|---|---|---|
| Vinningur | nr. 1: | 4452 |
| Vinningur | nr. 2: | 1950 |
| Vinningur | nr. 3: | 13277 |
| Vinningur | nr. 4: | 2758 |
| Vinningur | nr. 5: | 3140 |
| Vinningur | nr. 6: | 16456 |
| Vinningur | nr. 7: | 21750 |
| Vinningur | nr. 8: | 8591 |
| Vinningur | nr. 9: | 8685 |
| Vinningur | nr. 10: | 5016 |

Ringið til Kristionnu, tlf. 319017, ella Birgir, tlf. 210298.

# Bátur til sølu

Stórt føroyskt bygt 8-mannafar til sølu.



Báturin er bygdur í 1984 og hevur ein Yanmar 34 HK motor frá 1992. Øll kravd neyðútgerð er umborð og fylgir við eins og s e r g j ø r d presending bæði framman og aftan.

Báturin er væl røktur og annars í besta standi.

Vit miða eftir, at sølan fer fram sum skjótast.

Nærri fæst at vita við at ringja til tlf. 219652 ella 211817.

# Mekanikari

søkist til verkstað okkara í Hvalvík at byrja beinanvegin.

**O.K. Service**
Tlf. 422394 ella 210394

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# ÚTBJÓÐING

Við hesum verður arbeiðið viðv. gerð av landsvegi oman fyri Skála bygd boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið umfatar ein 9 m. breiðan veg frá verandi skákvegi suður móti Gjógvará, íroknað betongbrúgv um Kumlá. Samlaða vegalongdin er umleið 1,1 km.

Høvuðsnøgdirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Avgrevstur av bleytum tilfari | 14000 m³ |
| Spreinging | 22000 m³ |
| Uppfylling og planering | 36700 m³ |
| Skráar | 12700 m² |
| Brúgv um Kumlá | |

Lisitasjónin verður medio september 2001. Tíð og stað verður kunngjørt nærri í útbjóðingarskrivi, ið verður sent teimum bjóðandi.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 16. august 2001 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 2000,00, ið verður at flyta á konto nr. 128.220.6 í Føroya Sparikassa ella konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku aftan á lisitasjónina.

**Landsverkfrøðingurin**
Tinghúsvegur 5
100 Tórshavn

Telefon 311333 Telefax 314986 E-postur lv@lv.fo

Søkt verður eftir tveimum

# Maskinsmiðum / Rørleggjarum

til monteringsarbeiði.

Áhugað kunnu ringja til Petur L. Hansen á
**tlf. 311902 / 211903**

# 3-verilsis íbúð í Kbh.

til leigu í 3 vikur frá 25. august. Gott útsýni.

**Tlf. (0045) 24671264**

# Frisørsveinur

Hevur tú hug at royna nakað nýtt?

Vit mangla ein dugnaligan svein at arbeiða sum frisør í Salong Puls í Næstved.

Áhugaði kunnu ringja til:

**0045 55776925 og spyrja eftir Siggu**